# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Læra av oljubýnum Esbjerg

Oljuleitingin við Føroyar er ikki tað evnið, sum hevur átt tær stóru yvirskiftirnar leingi. Tá oljugongdin kortini hevur verið á breddanum, so hevur tað kanska meira verið fyri tað negativa. Her hugsa vit fyrst og fremst um avgerðina hjá BP at gevast í Føroyum, og vit hugsa um heldur laka úrslitið av 3. útbjóðing. Haraftrat frætta vit nú, at sjeyndi brunnurin, sum skuldi borast á landgrunninum nú í summar, ikki verður boraður nú men útsettur til næsta ár. Orsøkin er tann einfalda, at boripallurin er ikki tøkur í summar. Hetta er tað, sum kann henda.

At boringin verður flutt til 2010 heldur enn at borað verður í vetur er so uttan iva ein avgerð, sum fyrst og fremst Jarðfeingi hevur tikið. Føroyska oljufyrisitingin, sum fekk ein dyggan frammaná, tá BP gavst við síni boring í nærum hálvum gekki, tá og tí borað varð á vetrartíð, hevur vónandi lært av hesum mistakinum, nevniliga at loyva einum oljufelag at bora á vetri við einum boridagatali-klausuli. Øll vóru vit sum tikin á bóli, tá tað frættist, at BP gavst við boring síni uttan at hava borað heilt niður á ætlaða prospektið. Síðani hevur verið gitt, at táverandi leiðslan í Jarðfeingi gjørdi eina sera óhepna avtalu við oljufelagið BP, nevniliga at loyva felagnum at fáa ein evstadaga-boriklausul í avtaluna, vitandi um, at ein boring á vetri kundi krevja nógv longri tíð.

Hetta er so helst tað, sum ger, at Jarðfeingi nú heldur vil hava ENI at útseta boring til næsta ár enn at bora seint í heyst ella í vetur, sum kann enda við at draga út vegna vánaligt veður ol. Fyri føroyska samfelagið er eingin katastrofa hend við hesi avgerð. Vit kunnu bara staðfesta, at Jarðfeingi hevur lært av sínum "mistøkum" og nú vil tryggja sær, at oljufeløgini og Føroyar fáa optimalt burtur úr, tá borað verður.

Í næstum fer oljuleitingin kortini aftur at verða á breddanum. 20. mai verður nevniliga skipað fyri eini oljuráðstevnu í Havn við fleiri spennandi evnum. M.a. verður sett fokus á komandi Anne Marie brunnin á landgrunninum, har oddamaður hjá ENI fer at greiða frá. Eisini fer umboð fyri DONG at greiða frá oljutilgondini vestan fyri Hetland. Og sum eitt serligt evni verður sett fokus á Esbjerg sum oljubýur. Hvussu varð stætt, áðrenn oljan kom, og hvussu er býurin broyttur uppá gott og ilt, síðani oljan gjørdist høvuðsvinna. Morten Hahn-Pedersen, sum hevur skrivað bøkur um hesi evni, fer at vitja. Eisini verður í hesum sambandi spurt, hvussu vit hava og eiga at fyrreika okkum til eitt komandi stórt oljufund. Har fara m.a. Árni Olafsson, fyrrverandi formaður í Oljuráðleggingarnevndini og Petur Joensen, stjóri í Jarðfeingi at luttaka. Seinasta evnið á ráðstevnuni er landgrunnsmarkið uttanfyri 200 fjórðingar. Martin Heinesen, verkætlanarleiðari fer at greiða frá. Tað eru Oljuvinnufelagið, Oljutingið og Miðlahúsið, sum skipa fyri ráðstevnuni, sum verður hildin á Hotel Hafnia.

**Sosialurin**

## Javnstøða er millum kynini í flestum nevndum

JOHAN DAHL

landsstýrismaður



**Javnstøða er í flestu nevndum, sum landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur skyldu at velja. Einasta undantak er nevndin fyri Atlantic Airways, ið var trupul at samanseta**

Svar til opið bræv um nevndarval í Atlantic Airways.

Um hugt verður at hjálagda yvirliti yvir nevndarlimir í partafeløgum og grunnum, eg sum landsstýrismaður varði av, sæst, at javnstøða millum kynini er í øllum nevndunum, tó ikki í nevndini fyri Atlantic Airways.

Eg umsiti javnstøðumál og eri tí upptikin av, at javnstøða valdar í nevndunum, eg havi skyldu at velja. Tað var ikki javnstøða í nevndini, sum var fyri Atlantic Airways, og eydnaðist tað tíverri heldur ikki hesu ferð.

Valið av nevndini fyri Atlantic Airways var av ymsum orsøkum sera trupul, har atlit skuldu takast til fleiri áhugamál og viðurskiftir. Tó skal eg standa við ábyrgdina, eg havi av, at tað ikki eydnaðist at fáa javnstøðu í nevndina. Hetta verður tó eitt atlit, sum fer at liggja frammarlaga eina aðru ferð.

Í opna brævinum, sum er sent mær, verður spurt um, hvørjar førleikar, umboðini hjá landsstýrinum í nevndini hjá Atlantic Airways hava, sum ongin kvinna í landinum hevur.

Við tað, at landið ikki er einsamallur eigari í Atlantic Airways, og tá rætturin at velja nevndarlimir ikki eru reguleraður í partaeigarasáttmála, vórðu størru partaeigararnar tiknir við uppá ráð í sambandi við nevndarvalið.

Yvirskipað sæð hevði eg í huganum, at nevndin skuldi vera sett saman soleiðis, at hon á ein effektivan og frameftirlítandi hátt er før fyri at taka sær av sínum leiðsluuppgávum - herundir strategisku uppgávunum og eftirlitsuppgávunum – og samstundis vera ein konstruktivur og skikkaður sparringspartnari fyri stjórnina. Samstundis er umráðandi, at nevndin altíð tekur avgerðir óheft av seráhugamálum.

Í mun til virksemið hjá Atlantic Airways og til tær avbjóðingar, sum felagið hevur fyri framman, havi eg lagt dent á hesar førleikar:

**Royndir at reka vinnuvirksemi**

- Royndir at reka vinnuvirksemi innan vinnugreinina (flogferðslu)
- Vitan um felagið (P/F Atlantic Airways)
- Vitan um evropeiska flogferðslumarknaðin
- Royndir at virka á liberaliseraða evropeiska flogferðslumarknaðinum
- Royndir við altjóða vinnuvirksemi annars
- Búskaparligan og figgjarligan førleika
- Førleika innan strategiska leiðslu
- Royndir við nevndararbeiði

***Niðanfyri er eitt yvirlit yvir nevndarlimir í nevndum, sum landsstýrismaðurin í vinnumálum velur:***

**Atlantic Airways**
Bjarni Bjarnason, formaður
Petur Jónasson Eiriksson
Jens Willumsen
Kaj Johannesen, næstformaður
Verna Løvendahl-Rasmussen
Ingi Solberg Joensen

**Føroya Tele**
Heini Zachariassen, formaður
Reidar Nónfjall, næstformaður
Randi Fredriksberg
Ulla Sutherland Stenberg
Jónhild Rasmussen

**Vága Floghavn**
Kitty May Ellefsen, formaður
Johannus Egholm Hansen, næstformaður
Bárður Nielsen
Evy Jacobsen
Johan í Niðristovu

**Fiskaaling**
Sigurð Vang, formaður
Rúni Weihe
**Ragnar Joensen**
Leif av Reyni
Jóanna Djurhuus
Turið Mørkøre
Astrid Hansen

**Postverk Føroya**
Ben Arabo, formaður
Brynhild Setberg, næstformaður
Peter Holm
Petur Emil Tausen
Korinta Jarnfoss

**Framtaksgrunnurin**
Gloria Kalsø, formaður
Rúna Hilduberg, næstformaður
Hans Jákup Mikkelsen
Jóhannes Jensen
Annika Waag

**Vinnuframagrunnurin**
Hertha Olsen, formaður
Marita Rasmussen
Gissur Patursson
Alexander Samuelsen
Magnus Danielsen

**Smyril Line**
Klaus Kjærulff, formaður
Jens Meinhard Rasmussen
Súsan Klein Gregoriussen
Linda Guðleygsdóttir
Hendrik Egholm

**Føroya Lívstrygging**
Poul Hansen, formaður
Súsanna Sørensen, næstformaður
Una Joensen
Jógvan Mørkøre
Gunnleivur Dalsgarð

## Góði Hanus Kamban

Greinir tínar: Jesuspápi og hansara minstu - í Sosialinum fríggja- og mánakvøldið - kunnu ikki metast ov høgt, tí tær skera inn á bein, tá talan er um høgrakristindóm og reinan fanansskap, sum ofta vísa seg at vera tvær síður av somu søk. At láta sum um og at vera. Greinirnar áttu at verðið sendar øllum skúlum í Føroyum, so tær kundu verið tiknar til viðgerðar, sum liðið í verjuni móti øllum slagi av høgrakristnum ágangi burturi og heima. Tað er tað harðliga brúk fyri.

**Dagfinnur Danbjørg**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.